# Háskúlaskeið fyri fólk við sálarligum órógvi

**Fyri fjórðu ferð á rað skipar Stuðulstænastan saman við Føroya Fólkaháskúla fyri Háskúlaskeiði fyri brúkarar við sálarligum órógvi**

HÁSKÚLI

Ætlanin við háskúlauppihaldinum er at geva teimum luttakandi betri lívskvalitet, har tey fáa møguleika fyri at royna seg í ymiskum viðurskiftum undir vardum umstøðum. Hetta verður gjørt við at varpa ljós á førleikar heldur enn avmarkinganar, har luttakararnir kunnu virka undir fríum og kreativum umstøðum. Eisini fáa luttakararnir royndir innan sosiala samveru, av tí at nógv virksemi fer fram í felagsskapi við aðrar luttakarar.

Øll, ið eru áhugað í at koma á háskúlauppihald, eru vælkomin at melda seg.

Háskúlaskeiðið verður í døgunum 13. til 16. mai 2008.

Kunningarfundur um háskúlaskeiðið veður 1. apríl kl. 19.00 í Løkjukafeini, Løkjatún 1 á Argjum. Har fáa tey luttakandi møguleika fyri at gera sína ávírkan galdandi, áðrenn háskúlaskeiðið verður endaliga skipað. Verkstøðini, ið vóru á skeiðinum í fjør, vóru m.a. glas-, lista-, og skriviverkstaður.

Tilmelding fer fram við at venda sær til Løkjukafeina.

Møguleiki er fyri at søkja um figgjarligan stuðul frá Almannastovuni, um umsøkjarin lýkur figgjarligu treytirnar, ið eru ásettar í Almannalóggávuni.

- Vit gleða okkum til 1. apríl, tá kunningarfundurin verður í Løkjatúni, har vit vænta at síggja fleiri áhugað fólk, ið ætla sær at luttaka á háskúlaskeiðinum, sigur Stuðulstænastan og Føroya Fólkaháskúli.



## VEÐRIÐ




**Veðrið í dag**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, 3-8 m/sek. Út á fyrrapartin frískar hann vindin upp í 13 m/sek. Ælaveður, stundum kavaælingur. Hitin millum 1-5 stig. Mikunáttina fyrst norðan, sum snarar í vestan, undir 6 m/ sek. Turt og klárt. Hitin 0-4 stig.




**Veðrið mikudagin**
Fyrst útsynningur, 5-10 m/sek., sum út á dagin veksur uppí 8-13 m/ sek. Skýggjað og út á seinnapartin regn. Um kvøldið stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri ella útnyrðingi, 10-15 m/sek. Hitin 4-8 stig.




**Veðrið hósdagin**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, 10-15 m/ sek., seinni upp í 13-18 m/sek. av norði. Hitin millum 1-4 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -24 |
| Nuuk | -17 |
| Qaqortoq | -15 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 16 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ





## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 9/3 kl. 06⁰⁰ – 10/3 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,5°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 9/3 kl. 06⁰⁰ – 10/3 06⁰⁰.
Avfallið higartil í mars: 62 mm






## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 10. mars | Mánin næstur jørðini |
| 14. mars | Fyrra kvarter |
| 21. mars | Fullmáni |
| 26. mars | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. mars | 04.11 | 16.34 | 03.11 | 15.34 | 03.26 | 15.49 | 06.11 | 18.34 | 07.11 | 19.34 | 02.26 | 14.49 | 01.26 | 13.49 | 04.26 | 16.49 | 05.26 | 17.49 | 03.56 | 16.19 | 05.11 | 17.34 |
| 19. mars | 04.58 | 17.19 | 03.58 | 16.19 | 04.13 | 16.34 | 06.58 | 19.19 | 07.58 | 20.19 | 03.13 | 15.34 | 02.13 | 14.34 | 05.13 | 17.34 | 06.13 | 18.34 | 04.43 | 17.04 | 05.58 | 18.19 |
| 20. mars | 05.40 | 18.00 | 04.40 | 17.00 | 04.55 | 17.15 | 07.40 | 20.00 | 08.40 | 21.00 | 03.55 | 16.15 | 02.55 | 15.15 | 05.55 | 18.15 | 06.55 | 19.15 | 05.25 | 17.45 | 06.40 | 19.00 |
| 21. mars | 06.20 | 18.40 | 05.20 | 17.40 | 05.35 | 17.55 | 08.20 | 20.40 | 09.20 | 21.40 | 04.35 | 16.55 | 03.35 | 15.55 | 06.35 | 18.55 | 07.35 | 19.55 | 06.05 | 18.25 | 07.20 | 19.40 |
| 22. mars | 06.58 | 19.18 | 05.58 | 18.18 | 06.13 | 18.33 | 08.58 | 21.18 | 09.58 | 22.18 | 05.13 | 17.33 | 04.13 | 16.33 | 07.13 | 19.33 | 08.13 | 20.33 | 06.43 | 19.03 | 07.58 | 20.18 |


Alt um harmonikur



www.simme.eu